## Madeleine sagt ja

Teir, sum hava droymt um at fáa svensku prinsessuna Madeleine, kunnu nú fara at leita eftir onkrari aðrari, tí í morgun kunngjørdi kongshúsið í Stockholm, at Madeleine er vorðin trúlovað løgfrøðinginum Jonas Bergström. Tey bæði hava hildið saman í sjey ár. Í tíðindaskrivi frá kongshúsinum stendur, at Carl Gustav kongur hevur góðkent, at tann 27 ára gamla prinsessa verður trúlovað tí 30 ára gamla løgfrøðinginum, og at stjórnin hevur staðfest avgerð kongs. Hetta er annað trúlovilsi í svenska kongshúsinum í ár. Í februar varð Victoria, krúnprinsessa, trúlovað unnusta sínum Daniel Westling. Brúdleypið verður næsta summar.



# Tekin um stórar batar í havinum



**Eftir at toskaveiðan í føroyskum sjógvi hevur verið sera lítil seinastu árini, samstundis sum gýtingarstovnurin hevur verið søguliga lítil, bendir nú mangt á, at náttúruviðurskiftini aftur eru við okkum. Eftir at Havstovan hevur gjørt sínar yngul- og ætikanningar, er niðurstøðan, at gróðurin á landgrunninum í ár er væl yvir miðal, og fiskayngulin er yvirhøvur væl vaksin og hevur nógva føði í maganum. Sera nógv varð fingið av hvítingsbróðuryngli, eins og væl varð fingið av nebbasilda-, toska-og hýsuyngli**

NÁTTÚRA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í seinnu helvt av juni var Magnus Heinason úti og gjørdi yngul-og ætikanningar fyri Havstovuna. Á túrinum, sum byrjaði 19. juni og varð liðugur 29. juni, var Jákup Reinert toktleiðari. Onnur, sum umboðaðu Havstovuna við havrannsóknarskipinum, vóru Eilif Gaard, Sólvá Jacobsen, Lis Larsen og Røgvi Mouritsen.

Endamálið við yngul-og ætikanningunum er, sum Havstovan sigur, at fáa eitt mát fyri árgangsstyrkini hjá toski á landgrunninum og á Føroyabanka. Málið er eisini at fáa ábendingar um árgangsstyrkina eins og útbreiðslu og støddir hjá øðrum fiskasløgum, eitt nú hýsu, hvítingsbróðuri og nebbasild.

Tað er yngul, sum dentur verður lagdur á at kanna í hesum føri.

Hugt verður eisini at pelagisku vistfrøðini á landgrunninum og á Føroyabanka, umframt at "fronturin" kring landgrunnin eisini verður kannaður.

Í sínari niðurstøðu eftir kanningarnar, sigur Havstovan, at gróðurin á landgrunninum í ár er væl yvir miðal, og at fiskayngulin yvirhøvur er væl vaksin og hevur nógva føði í maganum. Sera nógv varð fingið av hvítingsbróðuryngli, eins og væl varð fingið av nebbasilda-, toska-og hýsuyngli.

Tað er niðurstøðan hjá Havstovuni í stuttum.

Sambært frágreiðingini, sum er skrivað um túrin, gekk alt væl á ferðini, og allar tær ætlaðu støðirnar vórðu tiknar. Onkur av manningini noyddist í land til fundar, men kom umborð aftur seinni á túrinum. Sum dagarnir gingu, og allar støðirnar vórðu tiknar, var Magnus Heinason aftur á Havnini einar 10 dagar eftir, at túrurin var byrjaður.

Jákup Reinert og Eilif Gaard, sum hava skrivað frágreiðingina um yngul-og ætikanningarnar, siga, at Føroyabanki vanliga er við í hesum kanningum, men í ár varð bert landgrunnurin kannaður.

- Í staðin fyri at kanna Føroyabanka, vórðu tveir dagar heldur brúktir til at kanna nebbasild á landgrunninum og kemur ein serstøk frágreiðing um hesar kanningar seinni, siga teir.

### 23 fiskasløg

Á einum øki vórðu 37 støðir tiknar, 34 í einum øðrum og 19 í einum triðja øki. Soleiðis vórðu tilsamans 90 støðir tiknar á hesum túrinum hjá Magnusi Heinasyni.

Djóraæti varð kannað á somu støðum, umframt at toska-og hýsuyngul eisini varð tikið til magakanningar. Yngulhál og royndir til kanning av umhvørvinum vórðu tikin og kannað samsvarandi túraætlan og sýnishandbókum.

Fyribilsúrslitini hjá Havstovuni vísa, at 23 ymisk sløg av fiskayngli vórðu fingið í mun til 25 sløg seinasta ár.

- Samanborið við 2008 fekk Magnus Heinason á hesum túrinum meira av átta fiskasløgum, nevniliga toski, hvítingsbróðir, sandsprøku, lállu, tungu, hornabrosmu og stubba, meðan minni varð fingið av øllum hinum 15 fiskasløgunum.

Jákup Reinert og Eilif Gaard siga, at við onkrum undantaki var yngulin í ár væl fyri.

- Á landgrunninum verður vanliga nógv mest fingið av hvítingsbróðuri, og soleiðis var eisini í ár. Eftir trý fylgjandi vánalig ár, var nøgdin av hvítingsbróðir sera stór í fjør, og í ár var nøgdin ájavnt henni í ár 2000, sum tá var metár, siga teir.

### Sera áhugavert

Eitt annað áhugavert, sum kanningarnar hjá Havstovuni vísa, er, at nú bragdar ordiliga aftur við nebbasild, sum eitt nú er grundarlagið undir føðini hjá fiski og fugli.

- Sera lítið hevur verið av nebbasild á landgrunninum árini 2005-2007, men í fjør var aftur so nógv nebbasild, sum ikki hevur verið at fingið áður síðan heilt aftur til 1974. Hóast væl minni vísir seg at vera av nebbasild í ár, er nøgdin kortini ájavnt við tey bestu árini í fleiri ár.

Jákup og Eilif halda, at nógv føði skuldi verið til steðar, bæði hjá fugli og fiski, og tað ger støðuna uppaftur betri, at nógv eisini er til av hvítingsbróðuri.

Havstovan hevur eisini gjørt upp nøgdina av toskayngli á landgrunninum síðan 1974.

- Eftir at nøgdin av toskayngli í fleiri ár hevur verið minkandi niður á eitt sera lágt støði árini 2005-2007, vaks hon aftur í 2008 til at vera beint omanfyri eitt miðal ár fyri alt tíðarskeiðið síðan 1974.

Jákup Reinert og Eilif Gaard kunnu vísa á tað gleðiliga, at nøgdin av toskayngli í ár er nærum tvífalt so stór sum í fjør, ið sum nevnt var yvir miðal.

- Hetta er sera áhugavert, tá framtíðartilgongdin til toskastovnin verður havd í huga. Kortini eiga vit at hava í huga, at hesin yngul fyrst skal svimja inn undir land, har hann veksur upp í 1-2 ár, áðrenn hann leitar út í tann vaksna stovnin.

Teir vísa á, at í hesum tíðarskeiði kann nógv henda, og vanlig verður roknað við, at endaliga boðið upp á, hvussu gýtingin hjá toski hevur hildnast, ikki fæst fyrr enn í endanum á uppvakstrartíðini.

Sum nevnt í byrjanini, hava kanningarnar hjá Havstovuni eisini til endamáls at kanna hýsuyngul, og fyri hýsu gjørdist úrslitið gott, hóast tað er nakað minni enn í fjør.

- Vert er at leggja til merkis, at í fjør varð mest veitt á tí djúpa økinum (II), men í ár varð mest veitt í teimum grynru økjunum (IN og IS).

Jákup og Eilif halda, at enn er ov tíðliga at siga nakað um, hvussu nógv kemur